VI‹MERKINGAR

Flogvøllur á Glyvursnesi?

Regin av Steinum
Valevni á tjó›-veldislistanum

Su›urstreymoy er ta› øki› í landinum, har fólkatali› veksur skjótast. Hetta er ein veruleiki, sum tey, i› rá›a fyri borgum, mugu taka í ramasta álvara. Tí eigur at vera mett gjølla um fólkavøksturin og tørvin á byggilendi. Hesi álvarsmál mugu ikki bara passa seg sjálv sum best ber til, men mynduleikin, t. e. fyrst og fremst b‡rá›i›, skal ganga undan og skipa alla bygging á skynsamasta hátt. Havast má í huga, at lendi› er avmarka›; vit hava ikki tær veldigu fløturnar, sum íslendingar hava.

Ein stórur (international›?) flogvøllur oman fyri Glyvursnes fer undir øllum umstø›um at seta mark fyri húsabyggin tann vegin – so og so dømi í so máta man vera havnarlagi› á Sundi: Um sama mundi sum hvítanesfólk hátí›arhildu 150 ára dagin fyri bygdini, fóru gravk‡rnar undir at sópa fyrndarbøin á Sundi burtur, tí har skuldi vera stór bryggja og havnarlag. Hvat sí›ani hendi, er væl kent. – At ta› nú kortini - eini 10 -15 seinni - ver›ur brúk fyri íløguni til frálandsvinnuna, er ein onnur søga.

Í sambandi vi› útbyggingina í Havn og kommununi annars eiga oljutangarnir á Vi›arnesi at vera fluttir burtur úr mi›deplinum. Har eiga teir ikki at vera longur, men anna› høskandi pláss útvega› a›rasta›ni í kommununi.

Tilgongdin skal ikki einsamøll st‡ra okkum, men vit skulu st‡ra tilgongdini til frama fyri so mong sum gjørligt, eisini tá i› val er.

Vit fegnast um ta›, sum er gjørt í Sandáger›i, hóast okkurt manglar í enn t.d. ein trappa vi› gøtu argjamegin og okkurt brúgvarskapilsi ella løgasteinar um ánna, men ver›ur bøurin í sjálvum ger›inum tikin ella nógv minka›ur av t.d. vegager›, so ver›ur plássi› spilt. Vit mugu hava rá› til at lata eitt sindur av tí gamla fáa fri›, sjálvt um vit eisini vilja hava frambur› og liva í nútí›ini.

íbú›a- og háhúsabygging. Vit mugu eisini ímynda okkum framtí›ina naka› soleiis, at búsetingarmynstri› ver›ur ø›rvísi enn í dag, og at fólk fara at flyta (t.d. av útbúgvingar- og vinnuávum) úr Føroyum og aftur nógv meira enn vit higartil hava sæ›, og tí má ta› vera lagaligt hjá fólki at fáa tak yvir høvdi›.

Fer› eftir fer› hava vit sæ›, at ikki nóg væl hevur veri› kanna› og mett um, tá i› stórar íløgur skuldu gerast. Eitt skúlaeksempul er flogvøllurin í Kastrup láta illa at.

Ta›, i› her er først fram, er ikki ta› sama sum at siga, at eingin flogvøllur skal byggjast, men at øll vi›komandi vi›urskifti og útlit skulu vigast og takast vi› í hesum máli. Vi›ger›in skal vera mest saklig og minst politisk – so er ta› sagt.

Práti› um flogvøll á Glyvursnesi plagar at koma í her›indum. Politisku signalini til almenningin hava veri› ógrei›, men eitt skal standa fast, og ta› er, at um ein n‡ggjur flogvøllur ver›ur bygdur, so skal landi› byggja, gjalda og reka.

Hvussu ver›ur og ikki, so skal arbei›i› upp á ringvegin sjálvandi halda fram tvørtur um Sandá í Reynsgøtu og líka ni›an á Hamarin.

Ta› ver›ur ney›ugt at gera ætlanir fyri bygging og vøkstur bæ›i fyri styttri áramál og langt fram í tí›ina. Hvussu sær kommunan út um 10 ár og 50 ár? Til tess at skapa veruliga b‡arbygging og dr‡ggja byggilendi› eigur meira at vera gjørt vi›

Kann Jóannes Eidesgaard hava rætt?

Zakarias Wang

Nú er naka› av or›askifti um, hvørt Jóannes Eidesgaard hevur rætt, tá i› hann sigur, at føroyingar eru ein tjó›.

Kjarnan í prógførslu hansara er, at ta› er so, tí ta› stendur í heimast‡rislógini.

Heimast‡rislógin er komin í gildi í Føroyum í 1948 sum kunnger› nr. 11. Henda kunnger› er gjørd tann 30. marts, og er hon prenta› í Færöernes Kundgörelsessamling, og har ver›ur sagt, at lógin kemur í gildi tann 1. apríl 1948.

Í danska tekstinum stendur einki um, at føroyingar eru ein tjó›. Har stendur bert, at Føroyar eru eitt sjálvst‡randi "folkesamfund" í tí danska ríkinum. Men í tí føroyska tekstinum stendur: "Føroyar eru sjálvst‡randi tjó› í danska ríkinum".

Ta›, Jóannes Ejdesgaard førir fram, er tí, at tann føroyska or›ingin er tann eingin hevur sæ› ta› nakra a›ra sta›ni. Ta› er tí einki at ivast í, at um so er, at heimast‡rislógirnar byggja á ein sáttmála, sum er gjørdur millum Føroyar og Danmark, so hevur Jóannes rætt í tí, sum hann sigur, at heimast‡rislógin ásetur, at føroyingar eru ein tjó›.

Eftir øllum at døma hevur løgtingsmeirilutin, sum í 1947 samtykti heimast‡rislógina, eisini veri› av hesi ásko›an. Tá Jóannes førir hesa útlegging fram, hevur hann tí undirtøku frá sínum egna flokki, sambandsflokkinum og sjálvst‡risflokkinum.

Men undirtøkan var í løgtinginum, tí hesum parti av heimast‡rislógini tók fólkaflokkurin eisini undir vi›. Men hann gekk ímóti lógini í síni heild, av tí at hann helt, at a›rir partar í henni ikki vóru í samsvari vi› ta›, sum løgtingi› hev›i samtykt sum grundarlag fyri tí sáttmála, sum gerast skuldi millum Føroyar og Danmark.

Tí skuldu vit trú›, at eingin ivi var í hesum spurningi.

Ta› er ta› heldur ikki frá føroyskari sí›u, men vansurin er bert tann, at danska stjórnin ikki vi›urkennir hetta sjónarmi›. Tá Jóannes førir fram at føroyingar eru ein tjó›, og at hetta er ásett í heimast‡rislógini, so er hann á samanstoytskós vi› sín andaliga fa›ir og stu›ulsveitara Poul Nyrup Rasmussen.

Hvussu kann Jóannes loysa hetta vandamál?

Annar møguleikin er, at hann sigur vi› Nyrup, at hann ikki meinar petti vi› ta›, sum hann skrivar. Velur hann hetta, sleppur hann tí, sum stendur í føroysku heimast‡rislógini, og vrakar ta›, sum flokkur hansara samtykti í 1947.

Hin møguleikin er tann, at hann stendur sum ein ma›ur og bo›ar Nyrup frá, at hann er ímóti tí donsku reingingini av sáttmálanum um heimast‡rislógina.

Hev›i Jóannes valt ta seinnu kósina – og hví skuldi hann ikki ta›? – so hev›i hann gjørt ta› nógv lættari hjá okkum øllum somlum at veri› ein partur av tí føroysku tjó›ini.

Opi› bræv til landsst‡ri ›

Marjus Dam,
løgtingsma›ur

Vi›víkjandi sigling um Vestmannasund, nú Ternan 1 skal á sleipistø› at skifta motorar.

Áheitan:

Eg fari hervi› at heita á Bjarna Djurholm, Landsst‡rismann, um at skipa fyri, at

1. Í fyrsta lagi›, at umvælingin av Ternuni 1 ver›ur upprioritera›, soleiis at arbeitt ver›ur í døgnarbei›i fyri at fáa ferjuna í sigling aftur skjótast møguligt. Møguliga kann alt arbei›i› tá gerast eftir einari viku.

2. Í ø›rum lagi› at skipa fyri, at anna› avloysaraskip ver›ur leiga/keypt til SL, soleiis at akuttir trupulleikar kunnu loysast vi› skipum, i› SL hevur til at taka. Tí hvørki um Vestmannasund ella Leirvíksfjør› kann SAM einsamallur røkja siglingina. So ney›ugt ver›ur vi› avloysaraskipi afturat undir øllum umstø›um. Ta› skal pengingur til slíkt keyp, men ta› er so ney›ugt, um samfer›slukervi› skal hava ta› stø›i›, i› flest øll ynskja, at ta› skal hava.

Grundgeving:

Ta› hoyrist, at SAM skal sigla einamallur um Vestmannasund allan novembur mána›a, íme›an Ternan 1 (n‡ggja) skal skifta motorar.

Ternan 2 (gamla terna) fer ongantí› aftur at flyta anna› enn fólk, eftir kravi frá skipas‡rinum. Hendan kemur sostatt ongantí› aftur at kunna røkja vanliga sigling um Vestmannasund.

Tosa hevur veri› um at skifta motorar á Ternuni 1, og peningur var› játta›ur fyri meiri enn einum ári› sí›ani til hetta endamál. Tí undrar ta›, at eingi tiltøk, so sum leiga av ferju hevur veri› gjørd, soleiis at tey í n‡ta farlei›ina um Vestmannasund ikki ver›a bjó›a slík vi›urskiftir, sum talan ver›ur um allan novembur mána›a.

Fyri okkum, sum n‡ta hesa farlei›, tykist loysnin burtur úr vón og viti. Tí longu ídag vita vit, at Ternan 1 hevur stórar trupulleikar vi› at føra fer›sluna um sundi›. Ein kann tí ímynda sær, at ein stórur trupulleiki ver›ur, tá i› bert SAM skal røkja farlei›ina.

Eisini kann ein spyrja, hvat henda skal, um ein av SL ferjunum fær brek. Hvat skip skal tá vera tiltaksskip?

Ta› er heilt marghátligt at hugsa sær, at farlei›in til allan ídna í Vágum eins og einasta flogvøll okkara skal misrøkjast á slíkan hátt, sum ætlanin er at gera í novembur mána›a.

Ta› tykist eftir míni hugsan, sum um Føroya Landsst‡ri ni›urprioriterar SL oyggjalei›ir so nógv, at ta› bert er ein spurningur um tí› til ongin sigling ver›ur um onkra farlei›. Í nevembur mána›a skal bert eitt líti› mekaniskt brek henda, so ver›ur als ongin sigling um okkurt sund ella fjør›.

Sum stø›an fer at vera um Vestmannasund allan Novembur mána›a er bert eitt at siga: Ta› kann ikki gó›takast. Sam kann ikki n‡tast til hesa farlei› - einsamallur.

Strandfer›slan má fáa skip afturat, í kann ver›a tiltaksskip, soleiis at fer›slan kann skipast rættuliga óbroytt, sjálvt um ein ferja skal til umvælingar e.l. Ella má arbei›i uppá Ternuna gerast li›ugt skjótast møguligt, t.v.s. at arbeitt ver›ur alt døgni› vi› gó›ari arbei›smegi, so at skip› kann koma í sigling aftur sum skjótast.

PS*Sum eg skilji liggja skip á støddd vi› SAM ella eitt vet størri í stórum tali í Noregi, og skuldi veri› lætt at fingi› fatur á einum slíkum. Eisini sjálvt um skotbrái› er stutt.

Pippi fyllir Sjónleikarhúsi›

Familjuleikurin »Pippi Langsokkur« er nú farin um sínar fyrstu s‡ningar – fyri fullum húsum!!! Ta› fegnast vit um, tí ilt er at fáa fólk at fara til sjónleik. Men vit kunnu sláa fast vi› s j e y t u m m a s e y m i beinanvegin at hesin leikur má síggjast og ikki minst hoyrast, tí tónleikurin saman vi› dansinum hjá Pippi og manningini runga í øllum húsinum og vit, sum vóru so heppin at síggja fyrstus‡ningina, geva henni eitt sólarklárt 13-tal! Onki minni!

Fyri at ta› skal ver›a eitt sindur forkunnugt at eiga eina Pippi-plakat, hava vit einans lati› prenta 500 eintøk. Vit hava valt at selja skránna hesu fer›, tí vi› henni fylgir ein tekning av Pippi, hestinum og apuni sum børnini kunnu lita og senda aftur til okkara. So ver›a tey vi› í lutakastinum um 20 Pippi-bøkur, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út fyrsta dagin.

Fyri at øll kunnu síggja allar tekningarnar fara vit at hava eina jólaframs‡ning á tann hátt at øll vindeyguni í Sjónleikarhúsinum ver›a á tremur vi› tekningum. Einasta treyt fyri at ver›a vi› í kappingini er at keypa eina skrá, lita› tekningina og senda hana aftur til okkara á›renn 15. des. 2000.

Fyri at ganga børnum og songartí› teirra á møti, spæla vit yrkadagar kl. 18. Í vikuskiftunum spæla vit kl. 16 og er ta› einamest fyri at bygdafólk eisini hava møguleika at koma í Sjónleikarhúsi› at uppliva Pippi í fullari fer› og sleppa heimaftur sama dag.

Annars kunnu vit siga frá, at fleiri s‡ningar longu eru útseldar og at seld eru

atgongumerki til næstan allar s‡ningarnar, serliga í vikuskiftunum.

Leikurin um sterku Pippi hevur fylt Sjónleikarhúsi› seinastu dagarnar

Føroyingar vi› klæ›um í Rumenia

Higartil í ár hava vit veri› tvær fer›ir í Rumenia vi› klæ›um, súkklum, steintoyi og ø›rum. Hjartaliga takk fyri øll tit, sum hava givi› og tit, sum hava skilt og pakka. Ta› er eitt stórt arbei›i, sum tit skulu hva stóra takk fyri.

Nú ver›a tri›ja fer›in, møguliga fjór›a fer›in vi› fyrireika›, ta› velst um pengarnir røkka til, tí slíkar fer›ir kosta naka›.

Tri›ja fer›in ver›ur nú. Vit fara hósdagin 2. nov. vi› tveimum bussum. Vit hava nóg miki› av klæ›um og ø›rum at hava vi›, ja, vit hava fingi› upp í elfiri bussar. Veturin stendur fyri durum, og tá ver›ur kalt hjá familjunum, sum ikki eiga fyri brenni. Har kann ver›a kalt um veturin, ja, ta› kann frysta ni›ur í 35 kuldastig. Tí hava vit higartil bjarga› øllum heiminum. Tit kunnu ikki hjálpa øllum í Rumenia«, seg›i ein vi› meg, tá i› eg var í Rumenia fyrstu fer›. Satt er ta›, men vit kunnu hjálpa nøkrum. Eitt jødiskt or›atak sigur, at tann, i› bjargar einum menniskja, hevur bjarga› øllum heiminum.

So vit vilja halda á vi› at hjálpa eftir førimuni. Naka› av peningi hava vit havt vi› okkum. Ikki geva vit hann burtur, men keypa til teirra, sum treingja; ta› er bíligt at keypa har ni›ri. So onkrum keypa vit mat og ø›rum brenni. Hetta kemur sera væl vi› hjá teimum, sum líti› eiga. Eisini tey ungu, sum ganga á universitetinum bi›ja um hjálp. Ta› kostar teimum 2.500 kr. at ganga har í tvey ár.

Um tú vilt stu›la hesum arbei›i vi› nøkrum krónum, ert tú vælkomin at seta peningin á konto nr. 1017602 vi› Abralon Matras og Kalla Vá›klett í Nor›oya Sparikassa. Vit takka hjartaliga fyri ta hjálp vit fáa.

Vit arbei›a saman vi› samkomuni Imanuel í Tórshavn.

Eisini vil eg her n‡ta høvi at takka »Smyril Line« fyri beinasemi í sambandi vi› flutning millum Føroyar og Danmark.

Vinarliga f.
Rumeniahjálpina
Absalon Matras

Heystmótas‡ning í Havnar Klubba

Handlar í mi›b‡num skipa fyri tveimum stórum mótas‡ningum í Klubbanum

Tí›indaskriv

Mikukvøldi› 25. okt. kl. 19.30 og høskvøldi› 26. okt., eisini kl. 19.30, skipa handlar í mi›b‡num fyri mótas‡ning og hugnakvøldi í Klubbanum.

Á s‡ningunum ver›ur ta› n‡ggjasta innan móta s‡nt fram. S‡ningarnar ver›a fjølbroyttar, alt frá innast til uttast, klæ›ir til børn, ung og vaksin. Ta› seinasta innan hármóta ver›ur sjálvsagt eisini at síggja. Somuei›is luttaka blómu- og gávuhandlar, so okkurt gott hugskot fæst uttan iva til veturin og jólini – ella er ta› ov tí›liga at hugsa um jólabor›haldini?

Luttakandi handlar: Niels Arge, Benetton, Th. Dam Ítróttur, Fandango, Fljó›i›, Handilskjarnin Damur og Harrar, Hjá Kissa, Hon & Hann, Kallkyn, Línbú›in, Madame L, Millennium, Mótaskálin, Seytjan, Sirri, Skálabú›in, Skótabú›in, Vilma, Vogue, Fótbúni, Mina Wilhelm, Akkuleya, Frú S, Trónd Hansen, Kvilt Hárfrí›kan og Salong Tóta.

Harafturat hava hesi eisini stu›la› tiltakinum: Atlantsflog, Maersk Air, Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Su›uroyar Sparikassi og Telebú›in.

Í ste›ginum er møguleiki at keypa lutase›lar. Hvør handil letur eina gávu ella gávukort, sum ver›ur luta› burtur undir sjálvari s‡ningini. Ein apex fer›ase›il vi› Atlantsflog ver›ur eisini at vinna.

Atgongumerki kosta 50 kr. og fáast í flestu av luttakandi handlunum og á Kunningarstovuni. Vi› í prísinum er kaffi og okkurt aftur vi›.

Leygardagin 28. okt. hava handlarnir opi› til kl. 17.00.

Malan stórverk um føroyskar skaldsøgur

Føroya Fró›skaparfelag gevur sum nr. 27 í rø›ini Supplementa út bókina: Malan Marnersdóttir »Hvør av ø›rum. Samanseting, frásøgn og millumtekstleiki í føroyskari skaldsøgu eftir 1970«.

Hvør av ø›rum vi›ger átta skaldsøgur: Frænir eitur ormurin, Tárnet ved verdens ende, Á fer› inn í eina óendaliga søgu, Lívsins summar, Á Su›urlandi›, …hvørt vi› sínar ná›ir, Undir su›urstjørnum og Rúm. Serligt ljós er sett á frásagnarvi›urskiftini í skaldsøgunum og millumtekstleikan. Endamáli› er at vísa, hvussu moderna› skaldsøga ver›ur søgd og hvussu skaldslig verk taka vi› or›um og myndum í undangonguverkum, skapa og umskapa tey á sín egna hátt. Gongdin í føroyskari skaldsøguskriving er l‡st í søguligum baks‡ni, eins og ta› sum er skriva› um skaldsøgurnar er vi›gjørt.

Malan Marnersdóttir

Ritger›in byggir á bókmentafrø›iligar rannsóknir hjá Gérard Genette og Dorrit Cohn: Serliga Julia Kristeva, Genette og Harold Bloom geva íblástur til vi›ger›ina av millumtekstleika (intertekstualiteti), og vi›ger›ina av tekstslagnum sjálvum hava Georg Lukásc, Milan Kundera, Frye lagt grund undir.

Bókin er ein dr.phil.-ritger›, sum ver›ur vard á Aarhus Universitet, auditorium 1, Tåsingegade 3, tann 1. desember, kl. 13.00.

Astri Luihn hevur gjørt permumyndina. Bókin er 407 bls. Hestprent hevur prenta›. Útsøluprísurin er kr. 285.